VIÐMERKINGAR

# Breiða semjan um vinnuna - og gongda leiðin

**Jón Guttesen**

Skjúrtuermar eru brotnar upp, slipsaknúturin loystur, samgonguskjal smíðað og breið semja er á breddanum. Men hvat fáa vit - ella ikki, viðvíkjandi vinnuni.

### Breiða semjan um at gera mismun á vinnum

Fólkaflokkurin hevur hendingaferð tosað um eina studningsfría vinnu, men formaður floksins hevur greitt staðfest, at politikkurin er »tað sum ikki kan standa noyðist ikki at fella«.

Virkandi formaður Sambandsflokksins hevur úttalað, at flokkurin er fyri einari studningsfríari vinnu, meðan landstýrismaður floksins við fiskivinnumálum sigur í viðtalu við útvarpið sama dag, sum hann er útnevndur, at skattalætti til rækjuvinnuna við innliman í FAS skipanina ikki skal roknast fyri at verða studningur.

Javnaðarflokkurin meinar eyðsýnt ikki, at studningsfrí vinna er eitt endamál í sær sjálvum, og hevur tí ikki havt hetta frammi í valstríðnum.

Samgonguskjalið nemur ikki við studning til vinnuna sum heild, men við studning til alivinnuna. Alivinnan skal verða búskaparliga sjálvberandi verður sagt. Hetta hava menn tó gloymt, longu áðrenn samgonguskjalið er undirskrivað, tá teir tala um at veita skattafyrimunir til alivinnuna.

Samanumtikið er breið semja um, at skattafyrimunir til ávísar vinnugreinir ikki er studningur, breið semja um at veita studning til ávísar vinnunugreinir. Samanumtikið er breið semja um at gera mismun á vinnum.

### Breiða semjan

– um andøðvsróður viðvíkjandi fjøltáttaðari vinnu og gransking.

Samgonguskjalið er ikki »visionert«, sum ovurfegni leiðarin í Sosialinum vil verða við. Á leið somu orðingar eru at finna í samgonguskjølunum frá 1998 og 2002 - tó eru orðingarnar hesaferð ikki stuðlaðar og útgreinaðar við ítøkiligum átøkum. Fyritreytirnar verða settar upp, men ítøkilig mál eru eingi, og eingin mátistokkur verður settur.

Eingi frambrot í granskingini, samskipan er lyklaorði. Hetta leggur man áherðslu á við at senda sama flokk og sama mann at manna sessin í Vinnumálaráðnum. Samskipan er ikki annað enn samskipan, samskipan av ov fáum krónum gevur aldri meir enn ov fáar krónir.

Samanumtikið - lyftir samgongan ikki hond frá síðu viðvíkjandi fjøltáttaðari vinnu og gransking, so er samgonguskjalið fylgt.

### Gongda leiðin

Ganga vit út frá, at ein króna brúkt til gransking lønar seg fleirfaldað aftur, tá úrslitini verða gagnnýtt, eigur gransking at verða eitt endamál í sær sjálvum. Málsetningurin átti at verði, at nøgdin av peningi nýttur til gransking skal útgera størri og størri part av fíggjarlógini. Málið átti at verið gjørt ítøkiligt við einum procenttalið.

Vinnan klárar ikki sjálv at bera granskingina frameftir, tann ábyrgdin liggur á undirvísingarøkinum. Men vinnan skal verða við og til hetta endamál átti skattafyrimunirnir at verða nýttir - her kann vinnan stuðlast. Málið kundi verði, at gransking verður skattað lagaligari, enntá kundi vinnan drigið gransking frá í skatti. Her er talan um ein skattalættað, ið hvørki ger mismun á vinnugreinum, ikki fastheldur vinnuni á einum ikki-lønandi leisti, skapar gróðrarbótn fyri framstigum í siðbundnu vinnunum og skapar grórarbotn fyri nýggju vinnugreinum.

Er gjógvin millum vinnuna sum heild og útbúgvingarstovnarnar stór, so er hon størri ímillum okkara útbúgvingarstovnarnar og okkara høvðusvinnur - fiskivinna og alivinna. Endamálið átti at verið, at henda gjógv skal vekk. Málið átti at verið at seta á stovn hægri læristovn fevnandi um lívfrøði, búskap, matvørulæru, osfr. ið hevur til endamál at nøkta tann alstóra tørv á gransking innan hesar vinnur, tann alstóra tørv á frambrotum innan hesar vinnur og tørvin á høgt útbúgvnum høvdum, sum tá verður skaptur. Ein læristovn sum kann geva hesum vinnum veruligt mótspæl og skapa vinnunum eina framtíð.

Samanumtikið er alneyðugt at vit stíga eitt risafet fram soðleiðis, at vit aftur verða í fremstu røð, tá tað ræður um fiskiskap, fiskaframleiðslu og aling.

# Droya samgonga, ella hvussu hon kallast

**Óla Jákup Kruse**

Fyrst, men ikki minst, vil eg hjartaliga takka harra Laksafoss fyri tað vælmeinta skattalættauppskotið, verka- og arbeiðarafjøldini at gagni, men, sum so síðan, av samgonguni bleiv vanskeplað til eitt heilt annað uppskot, ið so at siga bert gav teimum háløntu størsta skattalættan.

Ja, so ófantaliga legði nýklakta droya samgonga árarnar út. Ein kundi trú, at her var slíkur skundur, at tíð varð hvørki til at hyggja eftir um homlubond, áraella borðskeytar ella tollar vóru á samgonguskutuni, og helst ongin nøgla.

Ja, soleiðis skuldi okkara verkafólk, á hesum sinni, við eini javnaðarleiðslu, uppliva onki umboð at eiga á tingi.

Ikki hevði okkara góða gamla løgmanni, harra Peturi Mohr Dam, sála, dámt slíka viðferð, ið hendan samgongan borðreiðir fyri føroyska verkafólkinum.

Petur Mohr Dam, sáli, var ein hollur stuðul og ein hjartaligur verkamannavinur, har hann við kønari hond og hegni, saman við verkamannafjøldini reisti ta sokallaðu javnaðarháborgina, ein háborg, har verkafólk okkara altíð føldi ein fløva við grúgvuna.

Eitt skal okkara nýklækti løgmaður Eidesgaard vita, og tað er: at hevur okkara verkafólk, undir leiðslu av P. M. Dam, sála, uppbygt javnaðarháborgina, so ber tað eisini hesum somu verkafólkum, undir leiðslu av Eidesgaard løgmanni, til at ríva hesa somu javnaðarháborg niður aftur, um so er, at verkamannaumboðini ikki finnast í landsins leiðslu, hóast gott val og løgmann.

Tað hevði verið ein klænur og skeivur varði at sett í søgubøkurnar til okkara eftirkomarar at lisið um, at javnaðarháborgin fall undir leiðslu av Eidesgaard løgmanni, tí hugsað varð ikki um at leggja aftur at eldinum á javnaðargrúgvuni, og sum so við eitt var øskukøld.

Men ráð eru fyri hesum: um javnaðarumboðini bera so í bandi, at skattalættauppskotið hjá Laxksafoss kemur at virka eftir ætlan, nevniliga, at tey lágløntu fáa ein skattalætta upp á uml. 2.800,- kr. um mánaðin, tey miðalløntu fáa ein skattalætta upp á uml. 1.600,- kr. um mánaðin og tey vælbjargaðu háløntu fáa ein skattalætta upp á uml. 120,- um mánaðin, so er ein vón at hóma fyri framman, tí Javnaðarflokkurin hórar ikki undan, vendir hann verkamannafólkinum bakið.

# Almennur rapsoljufundur í Bládýpi

**Í dag, hósdagin 12. februar, verður kunnandi fundur á gistingarhúsinum Bládýpi í Havn, har týski verkfrøðingurin Alexander Noack fer at greiða frá um bilar ið koyra við raps- ella matolju**

*Tíðindaskriv*

Á fundinum fer týski verkfrøðingurin, Alexander Noack, ið starvast hjá fyritøkuni Tecnologie Elsbett GmbH, fer at greiða frá um bilar, ið koyra við raps- ella matolju.

Kunnað verður um, hvørjir bilar kunnu byggjast um, og hvussu hetta veður gjørt.

Í løtuni er tað bara VW Lupo bilurin hjá Erling Simonsen, ið koyrir við rapsolju her í Føroyum. Meðan Alexander Noack er her, fer han at byggja ein bil afturat um til rapsolju.

Fundurin er almennur og verður hildin á Bládýpi í Dr. Jacobsensgøtu 14-16 hósdagin 12.februar kl. 19.30

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, verður við á fundinum.

Orkuspurningar i síni heild verða havdir á lofti. Dentur verður lagdur á politisk og búskaparlig sjónarmið við náttúru- og umhvørvisvernd í huga.




*Í løtuni er tað bara VW Lupo bilurin hjá Erlin g Simonsen, ið koyrir við rapsolju. Nú skal næsti bilurin eisini gerast um til rapsbil*



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Hans Jacob Kollsker 45 ár



Tann 14. februar 2004 fyllir Hans Jacob Kollsker í Hoyvík 45 ár.

Hans Jacob er føddur á Eiði í 1959, foreldrini eru, Elinborg, f. Kalsoy, og Tóraldur Kollsker, fyrrverandi pantifúti, bæði av Eiði. Hann eigur tveir eldir brøður, tvíburarnar Terja og Eyðstein.

Báðir abbarnir, Hans Jacob Poulsen og Jóhan Kallsoy, sum hevur yrkt ymiskar sangir og sálmar, vóru løgtingsmenn, og sótu í tingi fyri ávikavist Javnaðarflokkin og Sjálvstýrisflokkin.

Hans Jacob er uppvaksin á Traðarvegnum í Havn. Hann lærdi til bilmekanikar hjá Jonhardi Brøðraberg í Havn og er eisini útbúgvin maskinmeistari.

Hans Jacob verður ofta settur í samband við stórar motorsúkklur og flottar bilar. Tað er heldur ikki av ongum, hann hevur altíð havt stóran áhuga fyri motorakførum og fekk sær tíðliga egnan bilverkstað, fyrst saman við Kurt Dal-Christiansen, og seinnu nógvu árini hevur hann havt sín egna plátu- og lakkeringsverkstað. Í fjør flutti hann inn nýggjan nútímans virkisbygning inni á Hjalla, har hann eisini selur SsangYong bilarnar.

Hans Jacob býr saman við Heidi Petersen, og saman eiga tey tvey ára gamla sonin, Teitur. Hans Jacob eigur eisini børnini: René, Rannvá, Tróndur og Tóraldur.

Føroya Fiskavirking:

## Majkin Olsen 25 ára starvsdag



Millum starvsfólkini sum vórðu heiðraði við blómum og gávum á samkomu hjá Føroya Fiskavirking 4. februar 2004 var Majkin Olsen úr Havn, sum hevur arbeitt á virkinum í meira enn 25 ár.

Majkin er 46 ára gomul og úr Havn, dóttir Jóhannu, f. Poulsen, av Oyrabakka, og Ejler Eysturtún í Havn.

Eftir lokna skúlagongd, sum 16-17 ára gomul, byrjaði Majkin at arbeiða á Bacalao. Hon hevur staðið við flakalinjurnar og havt ymiskar aðrar uppgávur á virkinum. Majkin sigur, at hon hevur trivist sera væl á flakavirkinum bæði hjá Bacalao og hjá Føroya Fiskavirking.

Majkin er gift við Jónleivi Olsen úr Streymnesi, tey búgva í Havn og eiga tvey børn: Fríðunn, sum býr Havn, og Svenn, sum er í útbúgvingarørindum í Danmark í løtuni.

Fiskiveiðieftirlitið:

## Kavaraprógv frá Kavaraskúlanum



29. januar 2004 fingu hesir kavaraprógv frá Kavaraskúlanum hjá Fiskiveiðieftirlitinum:

**Aftara rað:** f.v. Jógvan B. Reynslág, Tórshavn, Óla Hans Olsen, Vestmanna, Ragnar við Streym, Norðskála, Jóan Petur Johannesen, Funningur, Hilmar Johannesen, hjálparinstruktørur, Keistin Poulsen, hjálparinstruktørur.

**Fremra rað:** f.v. Rani Rasmussen, Tórshavn, Terji Juul, Tórshavn, Kenneth Michelsen, Tórshavn, Sámal E. Kyrrigerð, Klaksvík, Magni Petersen, Tvøroyri. Elmar Højgaard instruktørur vantar á myndini.

## Dagurin

**12. februar. Eulalia,** deyð umleið ár 300. Ung genta í Barcelona í Spaniu, sum varð pínd og myrd fyri trúar sakir. Er verndarhalgimenni hjá býnum Barcelona. Navnið er grikst og merkir *tann væltalandi.*

### Til minnis um vinmannin

## Jóannes í Hvalvík



Hyggjandi aftur um bak renna fólk fram fyri meg, sum eg eri takksamur fyri at hava fingið høvi til at kent. Jóannes Olsen ella Jóannes í Hvalvík, sum tey flestu nevndu hann, var ein av hesum. Blaðungur í sinnalag, fryntligur, virkin, hjálpsamur og handaliga og andaliga virkin til sín doyggjandi dag at kalla, 92 ára gamal.

18 ár vóru okkara millum; men rann aldursmunur mær ongantíð til hugs, tá vit hittust, eitt nú í arbeiðsørindum heima ella uttanlands. Hesin hábærsligi maðurin bar seg væl, og varð altíð fullkomin tøgn, tá Jóannes á fundi virðiliga tók orðið. Jóannes hevur ikki verið meira enn miðskeiðis í tjúgunum, tá eg fyrstu ferðina hitti henda merkisverda mann, sum í vánaligu tríatiárunum fór undir revahald, ið skjótt breiddi seg um alt landið og gav teimum manga tiltrongdu krónuna, sum dugdu at fáast við tað.

Í Vestmanna var faðir mín við í revahaldi, og var Jóannes teimum hollur at heita á, tá á stóð. Var tað neyðugt, var hann skjótur upp um fjøll fyri sjálvur at meta um, hvussu til stóð. Nakra samsýning fyri ómakin hoyrdi eg ongantíð talan um uttan hjartans tøkk.

Minnist meg rætt, var tað eisini Jóannes, sum fyrst undir krígnum mælti teimum til at gevast, meðan gott var.

At siga frá øllum, Jóannes hevur tykist við í dagliga føroyska samfelagslívinum, ber ikki til í stuttum minningarorðum; men eri eg honum takksamur fyri samrøðuna, hann í 1991 gav mær loyvi at taka upp á band – sannur dýrgripur av stillisligum, fyrstahonds frásagnum frá luttøku í helst hendingaríkasta tíðarskeiði í Føroya søgu, har vit av sonnum vita, at hansara partur ikki lá eftir. Tað var altíð hugnaligt at støkka inn á gólvið í gestablíða heimi teirra, Jóannes í Hvalvík og Hansinu úr Tjørnuvík, sum var honum góða kvinnan aftanfyri mannin. Ørindi míni tann dagin vóru at spyrja Jóannes um Hvalvíkskúnna, fyrsti dozarin í nýggjari føroyskari vegagerð; og tá tað evnið var fingið frá hondini, gloymdu vit okkum við einum góðum kaffimunni heilt burtur, hetta bæði innan og uttan landoddarnar, alt meðan bandið mól – eg hevði til alla lukku gloymt at sløkkja.

Jóannes var nú farin langt upp um tað, vit vanliga nevna mansaldur og kundi tí ikki óvæntað leggja frá sær; men saknurin er stórur í ikki longur at kunna taka telefonina og spyrja, hvussu tað nú var við hesum ella hasum og eftir góða frágreiðing og nøkur skemtilig orð aftur leggja rørið á.

Friður veri við minninum um Jóannes í Hvalvík.

***Heini Olsen***

†

Kunngjørt verður fyri vinum og kenningum,
at okkara kæra kona, mamma og omma

**Susan Skaaning**

andaðist mánadagin 9. februar.

Jarðarferðin verður úr Melby kirkju
leygardagin 14. februar kl. 10.00.

**Torben, Lone, Signe og Jakob**
**Erik, Christian, Jóhann og Jákup**